## tankar um lívið

Kim Simonsen skrivar

# Lívsnøktan og longsul

*"Og hví so mundi eg/ borg mína sorla, /og hørpustreingirnar/slíta og morla (...)"*
Janus Djurhuus 1923

Lívlangt lívsvirði er ikki lætt at finna. Gjøgnum lívið uppliva tey flestu nógvar ymiskar kenslur frá lívsgleði, lívsótta, lívshaturi, lívsvaml til lívsmegi og lívsvirði. Lívsnøktan er ikki tað sama sum at vera beinleiðis ella æviga eintur, nøgdur og væl hýrdur.

Kenslan av lívsnøktan spríkjur úr vantandi nøktan, men hetta trot er ikki heilt vanligt, tí vit tosa um kenslur, so sum sakn og longsul, og ikki t.d. um, at einum tørvar ein nýggjan bil, eina sofu ella okkurt forkunnugt í jólagávu. Ein jólagáva kann ikki, kanska í sera fáum umstøðum, geva lívinum sjálvum beinleiðis meining, tíðini nøktan og tí einstaka varandi virði í lívinum.

At sakna okkurt ella onkran er ikki tað sama sum, at einum vantar onkran ella okkurt. Portugisar brúka mangan vakra orðið saudade, um henda ógreinaða longsul eftir onkrum, ið ein ikki heilt veit hvat er, einum dreymi, einum staði, heimstaðinum, ella onkrum, ið ongantíð var ella hevur verið. Einum leingist nærum altíð við øllum vøddum, hjartanum og sansum, meðan ein bert vantar okkurt við kroppinum og skilinum. Longsulin er ikki sum ein tørvur, rættaður eftir onkrum ávísum, men sveimar um dalar og fjøll. Longsulin er tó ein partur av einum, í mongum førum eru vit tað okkum leingist eftir. Nógv royna at skúgva longsulin burtur, lata sær lynda og renna gamlar dreymar og ópassandi longsul á dyr, men hetta er gestur, ið herjar á sakleysan mann, á teg og meg, á øll, og kann fáa fólk at sorla borg sínar, leggja lív sítt oyðið. Tað er sum longsulin mangan er størri enn vit, sum onkur ella okkurt innaní okkum vil sorla og bróta, tí í hvørjum samanbroti er eitt frambrot og tí møguleikin fyri einum gjøgnumbroti goymt.

Leingist okkum eftir einum ávísum persóni, so er tað mangan samveran og lívið saman við persóninum vit tráa eftir, ikki bert at ávirka henda persón, men at kunna geva seg burtur, geva seg til hin, og geva tað burtur, at ein vantar okkurt. Tað hevur í hesum høpi ikki so nógv at siga, um ein longu er giftur, er longsulin nóg stórur og dirvið hartil, so sigrar longsulin mangan.

Munurin á at vanta okkurt og at fáa tað einum leingist eftir og hevur saknað, er tann, at mangulin er ein avmarkað kensla, so sum t.d. nøgd. Um ein fær ein djúpan longsul uppfyltan og okkurt ein hevur saknað kemur til ein, so er hetta sera heildarkent. Men hvussu vita vit um nakað ein hevur saknað og fingið er heildarkent? Jú, um vit veruliga kunnu vera okkum sjálvi, sjálvt um vit hava fingið tað vit ynsktu. Henda kensla er so umfatandi, at ein kann vera til í heiminum uttan at kenna seg noyddan, læstan fastan. Gjørligt er at fáa loyvi at vera ein sjálvur saman við øðrum, at kenna lívsnøktan, at ein veruliga livir og at tilveran er fylt við intensiteti.

Longsulin er mangan longsulin eftir at vera bjargað til at kunna vera okkum sjálvi, gjøgnum onnur. Gjøgnum trúskap og alsk droyma vit um at geva okkum burtur, men bæði saknur og longsul eru rættað ímóti einari ógreinaði heildarhugsan, og tí er at báðar kenslur mangan duldar, ivandi, óskilligar og ósvaraðar av okkum sjálvum. Bæði saknur, longsul og tað vit sakna og leingjast eftir, eru heildarkendar kenslur, ið umfata nærum alt, tí hetta er samantvinnað við rakstrarmáttin handan saknin og longsulin, ið ikki eru ávísir tørvir, ynski ella vónir, men sjálv lívstrongdin, ið er trongdin til lívsnøktan, lívsútfoldilsi og eitt so langt orð sum sjálvsveruleikagerð. Lívstrongdin er trongdin til at breiða seg sjálvan út, royna seg sjálvan og tilogna sær heimin. Henda trongd hevur tveir formar, hin fyrri er hin virkni og uppíleggjandi, meðan hin seinni vil sameina, binda sjálvan teg saman við umstøðunum, hinum og felagsskapinum. Men er hjartað ikki við, so hvørvur lívsnøktan og longsulin tekur við aftur. Tá byrjar alt av nýggjum.

# Málbitin

**Máltíð**
Ikki er óvanligt, at máltíð verður viðfarið sum hvørkikynsorð: "eitt gott máltíð", eyðvitað tí at danska orðið "måltid" av einihvørji orsøk hevur skift kyn og nú er hvørkikynsorð. Á føroyskum er orðið máltíð, eins og orðið tíð og orð við -tíð sum seinna liði, kvennkynsorð. Ein góð máltíð. Hvør kundi fingið seg til at sagt t.d. "eitt búrmáltíð"!

**Ferja**
Tó hevur borið rættiliga væl til at fáa undirtøku fyri orðinum ferja í staðin fyri tað óføroyska "ferga". Sagt varð í spurnakapping, at skipið æt "Sundafergan" - tað rætta var Sundaferjan, og tað at skipið bar hetta navn, gjørdi ivaleyst sítt til at slóða fyri føroyska orðinum ferja. Vit hava dømi úr kvæðunum um orðið ferja, og í fornmáli og øllum norðurlandamálum eitur tað ferja - uttan í donskum, - men har æt tað eisini "færie" í gomlum døgum. Tað var soleiðis, at -rg- og -rj- inni í orðum kom at ljóða eins, bert sum eitt r. Morgen og færie ljóðaðu sum frá leið: [m ? ù « n ] og [f E ù « ], og av tí kom óvissa í stavsetingina, og orð, sum søguliga høvdu rj, vórðu skrivað við rg, sum t.d. færge. Eingi uttan vit føroyingar hava sagt hetta g, sum í royndum er eitt "huldu-g", eitt g, sum aldri hevur verið til í donskum uttan á pappírinum og í vissum lesiframburði. Føroyingar hava t.d eisini tosað um at "avverga" okkurt fyri at verja fyri onkrum, og at vera "hergaður" í andliti, og hvørt mansbarn hoyrir, hvussu rangvørgt tað ljóðar. Og tílíkt orð er "ferga". Tann formurin, sum hevur søguliga grund, er ferja, og hann eigur eisini framtíðina fyri sær.

**Sálmur - kongur**
Ikki so sjáldan hoyrast orðini sálmur og kongur við veikari bending í eykaføllum, t.e. "sálma" og "konga". Hetta man vera árin frá donskum salme og konge. Orðið sálmur bendist sálm , sálmi, (sálms), og kongur, kong, kongi, kongs.Tey sungu ein sálm (ikki "sálma"!). "Tað stendur í einum sálmi (ikki "sálma"!) eftir Dávid."

**Sandvíkahjalli**
Sandvíkahjalli er nýtt staðarnavn. Har sum Tórshavnar býur hevur ruskbrennistøð í gerð, eitur frá gamlari tíð á Hjalla, men tað hevur tókst neyðugt at hava eyðkenniligari navn á hesum stað, sum er so nógv frammi í tíðindum og almennari umrøðu. Hesin staður er oman fyri Sandvíkar, og tí er tað komið mest sum av sær sjálvum at knýta hetta navnið upp í gamla Hjalla-navnið. Men Sandvíkar er fleirtalsnavn, og í hvørsfalli eitur tað tí Sandvíka. Navnið er tí rætt stavsett Sandvíkahjalli og ikki "Sandvíkarhjalli", sum tað ofta sæst skrivað.

*Úr Orðafari, nr. 2, 1987*

whazzzup!!!

Forrige ▾ Næste ▾ | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast ▾

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Janhild Blum, Ný Sæland, janhild@blum.co.nz
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

# Vínsmakking í Ný Sælandi

Eg eiti Janhild Blum. Eg eri upprunaliga úr Klaksvík, men havi búð í Ný Sælandi í 11 ár, fyrst í Wellington í 10 ár, og síðani í Aucklandi tað seinasta árið.

Nú eru føroyingar nokk ikki stórir víndrekkarar, men eg fari kortini at skriva eitt sindur um Ný Sælendskt vín, eftirsum, at Ný Sæland er eitt so vínríkt land. Flestir føroyingar kenna nokk til Marlborough Chardonnay – eg havi í hvussu er ofta keypt hetta vínslagið í Rúsuni í Klaksvík, tá ið eg havi verið heima og vitjað.

Mong eru vínøkini í Ný Sælandi, millum onnur Gisborne og Hawkes Bay (á Norðuroynni), víðagitin fyri Chardonnay; Marlborough (á Suðuroynni), kent mest fyri Savignon Blanc; Martinborough, kent fyri Pinot (eitt slag av reyðvíni, ið er nakað léttari og ljósari, enn Cabernet Savignon). Vín verður eisini framleitt í mongum øðrum økjum í Ný Sælandi. Summir víngarðar eru stórir við risastórari framleiðslu, meðan aðrir eru mest líkir einum lítlum húsum, har lutfalsliga fáar fløskur verða framleiddar um árið. Ein víngarður, ið eg vitjaði fyri nøkrum árum síðani, var enntá ein gomul kirkja.

Ný Sælendskt vín er ógvuliga væl umtókt, bæði her og uttanlands. Mangan er vínið so gott sum útselt, næstan áðrenn tað verður boðið til almenna sølu.

Í Martinborough, eitt ógvuliga gott vínøki, sum liggur umleið hálvanannan tíma norðanfyri Wellington, á eystursíðuni av norðuroynni, verður ein árligur Vín og Mat Festivalur hildin. Tá ið "The Martinborough Wine & Food Festival" varð hildin fyri fyrstu ferð í 1991, vóru Ný Sælendarar nokk heldur ikki teir stóru víndrekkarar. Tá tók tað umleið fimm mánaðir at selja tey 2500 atgongumerkini, ið boðin vóru til sølu. Í ár varð 10 ára jubileum hildið, og tað tók 50 minuttir at selja tey 10.500 atgongumerkini, ið boðin vóru til sølu. Fólk eru púra vill eftir at sleppa við. Í ár vóru maður mín og eg ímillum tey hepnu, ið sluppu við.

Festivalurin var ógvuliga væl lagdur tilrættis. Einir 12-18 víngarðar luttaka á hvørjum árið. Festivalurin byrjaði klokkan 10 um morgunin. Atgongumerkið skuldi býtast um við eitt vínglas við "hurðina" og man mátti veksla pening um til "Frankar", tann einasti "peningurin", ið varð góðtikin á Festivalinum. Víngarðarnir liggja spjaddir á einum øki, ið er umleið 100 hektarar. Bussar koyrdu runt alt økið alla tíðina, so tað lá væl fyri at vitja fleiri av víngørðunum. Fólk vóru í góðum hýri, og mangt skemtiligt fór fram í bussinum. Tað varð sungið og skemtað, øll vóru vinarlig og tosaðu saman. Tað er sjálvandi altíð onkur, ið hevur fingið í so nógv uppí høvdið. "Olé, olé, olé, olé..." sang ein so hart hann orkaði — tað ljóðaði ikki heilt ólíkt einum busstúri norður til Klaksvíkar aftaná Ólavsøku. Nógvur góður matur varð eisini at fáa, millum annað Whitebait (ein evarska lítil fiskur, ið verður etin heilur, man er noyddur at eta einar 500 fyri at verða mettur!). Á hvørjum víngarði stóð ein av teimum bestu matstovunum í Wellington fyri mati, og kappingin var hørð um tann besta rættin. Undirhald var eisini á hvørjum víngarði, og aftur vóru tað nakrir av teim best umtóktu tónleikarunum í landinum, sum vístu hvat teir dugdu.

Vit smakkaðu nógv ymisk vínsløg og ótu nógvan undarligan mat, men eg má tó viðganga, at tá ið tað leið út á dagin, og hitin byrjaði at gera um seg, var tað einari kaldari Føroya Bjór, ið eg longdist mest eftir.

ítróttur
Nr. 238 • leygardagur • 8. desember 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Munurin fer at minka


*Vinna sørvingar dystin móti Fleyr í dag, fara teir fram við Fram á fyrstaplássinum*

**Bæði oddaliðini hava frí, og tí skal hetta vikuskiftið brúkast til at finna útav, hvaðani størstu hóttanirnar til Fram og TB koma. Hjá monnunum er SÍ eitt gott boð, meðan Mjølnir sær sterkast út hjá kvinnunum**

FLOGBÓLTUR
*Emil Lisberg Jacobsen*

Í dag verður 8. umfar í meistaradeildunum hjá monnum og kvinnum spælt. Og tað ber longu nú til at siga, at bæði hjá TB-kvinnunum og Fram-monnunum verður leiðslan á stigatalvuni onkursvegna minni aftaná dystirnar í dag. Tað er nevniliga soleiðis, at bæði TB og Fram hava frívikuskifti, og hetta er tí eitt gylt høvi hjá hinum liðunum at taka eitt sindur inn aftur á oddafiskarnar báðar.

### Týdningarmikið í Vágunum

Serliga hjá SÍ ræður um at vinna í dag, og á heimavølli móti Fleyr skuldi ikki verið ómøguligt. Higartil í ár hava sørvingar verið ein flokk omanfyri Fleyr, og við einum sigri í dag taka teir oddasessin aftur frá Fram, tí teir hava betri settmun. Fyri Fleyr er hetta hinvegin ein sera góður møguleiki at fáa veruligt samband við oddaliðini aftur, so munurin ikki verður alt ov stórur, tá stigini um eina viku verða koyrd í helvt. Og teir í Fram fara ivaleyst eisini at fylgja væl við og munnu vóna, at arvafíggindarnir úr Fleyr fara at gera okkurt við SÍ.

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum er botndystur. ÍF, sum hevur tapt allar sjey dystirnar higartil, tekur ímóti Mjølni á Kambsdali, og hyggja vit eftir stigatalvuni, er tað nærliggjandi hjá ÍF at siga "skal tað verða, so skal tað verða nú".

Møguleikin er sjálvandi har, men Mjølnir vil neyvan verða einasta liðið, sum hevur tapt móti ÍF í grundspælinum, har fuglfirðingar spæla sín seinasta dyst í dag.

### Hvør skal hótta TB

Eisini hjá kvinnunum hittast ÍF og Mjølnir á Kambsdali í dag. Og hesin dysturin er avgerandi fyri, hvør verður størsta hóttanin hjá TB.

Tvørágentur eru fremstar við 12 stigum fyri sjey dystir, og síðani koma ÍF og Mjølnir við seks stigum fyri seks dystir. Við øðrum orðum er hetta dysturin um 2. pláss. Mjølnir hevur í seinastuni av álvara fingið fótin fyri seg, og tær mugu metast sum favorittar í dag.

Á Giljanesi hava bæði Dráttur og Fleyr brúk fyri stigum. Serliga Fleyr liggur tungt í sjónum, men eisini Dráttur má royna at fáa stig. Teirra síðsti sigur kom móti Mjølni 3. november, men tað er skjótt langt síðani.

Tað hoyrir við til søguna, at Dráttur bara hevur spælt ein dyst síðani tá, og hann var enntá móti TB í Trongisvági, men øll stig hava týdning, ikki minst nú kvinnukappingin sær út til at gerast rættiliga jøvn.

## Uttan stuðlar - ongin kapping

Sosialurin skrivaði hósdagin um Sóleyð Ísaksdóttir Jacobsen, sum hevur vunnið Miss Galaxy kappingina í Føroyum tvær reisur. Sóleyð vil tó gera vart við, at uttan stuðlar hevði hon ikki kunnað luttikið í eini tílíkari kapping.

Stuðlarnir hjá Sóleyð eru: Atlantic Airways, KS Timburhús, Fotobúðin í Handilskjarnanum, Farodane og Flogfelag Føroya.

**-ib**

## Dystir hetta vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08.12 | 14.30 | Kyndil-VB | Poli/Jústines |
| 09.12 | 14.30 | Neistin–Søljan | Kári/Trúgvi |
| 09.12 | 15.00 | Stjørnan-VÍF | Hjalmar/Kristian |

1. deild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08.12 | 16.00 | Kyndil-KÍF | Poli/Jústines |
| 09.12 | 16.00 | Neistin-H71 | Kári/Trúgvi |
| 09.12 | 16.00 | Tjaldur-VÍF | Hannis/Uni |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08.12 | 13.00 | ÍF-Mjølnir | Fossánes |
| 08.12 | 16.00 | Dráttur-Fleyr | Fossánes |

Meistaradeild menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| 08.12 | 14.00 | SÍ-Fleyr | Fram |
| 08.12 | 15.00 | ÍF-Mjølnir | Fram |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 7 | 6 - 1 | 19 | 6 | 13 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 6 | 3 - 3 | 12 | 11 | 1 | 6 |
| 3 | ÍF | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 4 | Dráttur | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 5 | Fleyr | 5 | 1 - 4 | 4 | 14 | -10 | 2 |

GG: ÍF vann 3-1 móti Fleyr í Havn, men eftir kæru frá Fleyr hevur Flogbóltssambandið avgjørt, at dysturin skal spælast av nýggjum. Úrslitið, Fleyr-ÍF 1-3, er tí strikað úr samlaðu støðuni.

### Meistaradeild, menn

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fram | 7 | 6 - 1 | 19 | 10 | 9 | 12 |
| 2 | SÍ | 6 | 5 - 1 | 16 | 6 | 10 | 10 |
| 3 | Fleyr | 6 | 3 - 3 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| 4 | Mjølnir | 6 | 2 - 4 | 11 | 14 | -3 | 4 |
| 5 | ÍF | 7 | 0 - 7 | 5 | 21 | -16 | 0 |

## Hondbóltsstøður

### 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 9 - 0 - 0 | 263 | 158 | 105 | 18 |
| 2 | Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 254 | 187 | 67 | 16 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 197 | 175 | 22 | 12 |
| 4 | VB | 8 | 4 - 0 - 4 | 198 | 198 | 0 | 8 |
| 5 | Sóljan | 9 | 2 - 0 - 7 | 185 | 255 | -70 | 4 |
| 6 | Kyndil | 10 | 1 - 0 - 9 | 218 | 269 | -51 | 2 |
| 7 | StÍF | 8 | 1 - 0 - 7 | 133 | 206 | -73 | 2 |

### 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 8 - 1 - 0 | 261 | 207 | 54 | 17 |
| 2 | Neistin | 9 | 7 - 2 - 0 | 274 | 232 | 42 | 16 |
| 3 | H71 | 10 | 5 - 1 - 4 | 270 | 271 | -1 | 11 |
| 4 | StÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 270 | 271 | -1 | 7 |
| 5 | Tjaldur | 9 | 2 - 2 - 5 | 218 | 246 | -28 | 6 |
| 6 | KÍF | 9 | 2 - 1 - 6 | 228 | 258 | -30 | 5 |
| 7 | Kyndil | 10 | 2 - 0 - 8 | 230 | 266 | -36 | 4 |